## 2005 gott arbeiðsár

Hagtøl hjá grønlendska heimastýrinum vísa, at í 2005 var virksemið í Grønlandi størri enn tey fimm undanfarnu árini, sigur útvarpið í Nuuk. Í 2005 vóru 28.661 ársverk, og tað var 641 fleiri enn árið fyri. Tann største vøksturin var í almennari umsiting og tænastu, og har vóru ársverkini 621 fleiri enn í 2204. Grønlendska hagstovan sigur, at 45 prosent av øllum ársverkum í Grønlandi eru innan almenna umsiting og almennar tænastur.



# Undirsjóvartunnilin í Sandoy og Eysturoy skulu gerast í senn

**Tað er kravið, sum Páll á Reynatúgvu setir, nú samgongan skal taka støðu til ætlanina at gera Skálafjarðartunnilin. Hann er tungan á vágskálini í samgonguni og nú ger hann púra greitt, at tað verður ómøguligt hjá samgonguni at semjast uttan so, at báðir undirsjóvartunlarnir verða gjørdir samstundis**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Páll á Reynatúgvu, tingmaður fyri samgonguna, setir sum eitt avgjørt krav, at undirsjóvartunnilin í Eysturoy og í Sandoy, verða gjørdir samstundis. Tað ber ikki til at finna politiska semju um nakað annað, staðfestir hann*

Undirsjóvarsjóvartunnilin í Sandoy og í Eysturoy skulu gerast í senn.

Hetta er tey púra greiðu boðini frá Pálli á Reynatúgvu til samgonguna.

Samgongan hevur bara 17 tinglimir í rygginum og tí krevst, at full semja er um øll mál, sum hon ætlar at fremja.

Páll á Reynatúgvu av Sandi er á tingi fyri Tjóðveldi og sostatt er hann ein avgerðandi stuðul undir samgonguni, akkurát, sum øll hini tingfólkini í CHE samgonguni eru.

Og hann ger greitt, at tað verður ongin politisk semja um at gera annan tunnilin fyrst og at lata hin sostatt bíða til aftan á.

- Politiskt verður ikki farið undir at gera undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy uttan at tað samstundis eisini verður farið undir at gera undirsjóvarutnnilin í Sandoynna.

- Eg vóni ikki, at samgongan hugsar sær, at nakað annað er gjørligt, enn at gera báðar tunlarnar samstundis, leggur hann afturat.

Hann staðfestir, at tað er hansara greiða støða.

Hann var framsøgumaður hjá Tjóðveldi, tá ið løgtingið í farnu viku viðgjørdi eitt uppskot um at játta pening til samráðingar ímillum Vinnumálaráðið og privata felagið, sum ætlar at gera Eysturoyartunnilin.

Vit hava spurt hann, um restin manningini hjá Tjóðveldi er samd við honum í hesi støðu.

- Flokkkurin hevur so ikki sagt nakað annað og eg havi heldur ikki fingið nakra rættleiðing um tað.

Hann leggur afturat, at við hesum hevur hann ikki kravt, at báðir tunlarnir skulu leggjast í sama felag.

Teir skulu bara gerast ísenn.

Hann staðfestir, at ein og hvør útseting, er ein útseting í eini fýra til seks ár og tað kann ikki koma upp á tal.

### Órógva báðar tunlarnar

Páll á Reynatúgvu ivast í um tað er rætt at taka Eysturoyartunnilin úr hondunum á teimum privatu og leggja hann í eitt alment partafelag.

Hann stúrir fyri, at tað kann órógva ætlanina og tí sær hann fyri sær, at privata felagið varðveitir Eysturoyartunnilin og landið ger Sandoyartunnilin.

Annars minnir Páll á Reynatúgvu á, at tað stendur beinleiðis í samgonguskjalinum, at samgongan hevur sum mál at verandi útbyggingingar halda fram.

- Løgtingið hevur samtykt, at Sandoyartunnilin skal gerast og tað haldi eg, at vit skulu gera.

Landsstýriskvinnan í vinnumálum kann tann dag í morgin skriva sáttmála við eitt byggifelag um at gera tunnilin, bara hann ikki kostar meiri enn 690 krónur.

Hann staðfestir, at sostatt er ætlanin at gera Sandoyartunnilin komin longri enn ætlanin at gera Eysturoyartunnilin.

- Eysturoyartunnilin er eitt gott hugskot, men tað má setast í samanhang við aðrar útbyggingar. Og veruleikin er, at tað frammanundan longu er koyrandi ímillum Eysturoy og Streymoy, samstundis sum tað ikki er koyrandi í Sandoy.

### 39 milliónir í 15 ár

Tilsamans fara teir báðir undirsjóvartunlarnir at kosta næstan tvær milliardir.

Spurningurin er, hvussu Páll á Reynatúgvu hugsar sær, at tað skal bera til at gera tvær so stórar verkætlanir ísenn, serliga vissi tað skuldi enda við, at tað almenna yvirtekur Eysturoyartunnilin, so at hann eisini skal á fíggjarlógina.

Eysturoyartunnilin gevur avlop og yvirtekur landið hann, endar alt avlopið í landskassanum. Men hóast tað privata ger tunnilin, kann landið tryggja sær ein part av avlopinum.

Hinvegin mugu vit ikki gloyma, at fast samband við Sandoy, er fyrsta stigið til undirsjóvartunnil til suðuroy og so sleppur landið undan útreiðslunum til Teistan og Smyril.

Páll á Reynatúgvu sigur, at Sandoyartunnilin kann fíggjast við at játta 39 milliónir um árið í 15 ár. Tað, sum so manglar í, kann fíggjast við bummgjaldið.

Men var tað ikki akkurát hetta, sum Tjóðveldi so kraftiga átalaði í valstríðnum, at undanfarna samgonga ikki vildi fíggja ymsar útbyggingar so hvørt, men ætlaði at senda næstu ættarliðum rokningina?

Her skal viðmerkjast, at ein atfinning ímóti undanfarnu samgongu, var, at ætlanin var at leggja verkætlanir í feløg uttanfyri fíggjarlógina. Sostatt kom fíggjarlógin ikki at vísa eina rættvísa mynd av virkseminum í landinum og tá var stórur vandi fyri at missa tamarhaldið.

Páll á Reynatúgvu sigur, at Sandoyartunnilin er so stór verkætlan, at skal hann fíggjast í byggitíðini, skulu minst 175 milliónir játtast um árið í trý ár og tað verður ómøguligt at fáa politiska semju um tað, tí so verður ikki rúm fyri nógvum øðrum.

- Men verður íløgukarmurin øktur, er tað ongin trupulleiki, leggur Páll á Reynatúgvu afturat. Og fyri tað um tunnilin verður fíggjaður yvir eini 15 ár, kann hann sjálvandi standa á fíggjarlógini hvørt árið.

# Taka skjóta avgerð um tunlarnar

**Samgongan hevur sett sær fyri at taka støðu til spurningin um undirsjóvartunnil í Eysturoy í næstum og tann avgerðin fær eisini týdning fyri tunnilin í Sandoy**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður í næstu framtíð, at samgongan fer at taka avgerð um, hvussu verður vorðið við ætlanini at gera undirsjóvartunnil í Eysturoy.

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum hevur upplýst fyri Løgtinginum, at fleiri møguleikar eru, men hon vil ikki útgreina teir, fyrrenn ein avgerð er tikin.

Ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er, at taka Eysturoyartunnilin frá teimum privatu afturfyri eitt endurgjald, sum heldur tey skaðaleys og at leggja hann í eitt alment partafelag fyri at brúka avlopið til at fíggja aðrar verkætlanir við, eitt nú Sandoyartunnilin.

Men øll eru ikki samd í hesum, tí tey halda, at tað er órættvíst, at eysturoyingar og norðoyingar skulu betala fyri Sandoyartunnilin.

Hinvegin halda onnur, at vit búgva í einum samhaldsføstum samfelag, har øll eru felags um útreiðslurnar.

Tað er eisini nevnt, at skal eitt privat felag gera Eysturoyartunnilin, er tað at bróta eina gamla grundreglu um, at tað er tað almenna, sum stendur fyri øllum samferðsluútbyggingum.

Og Bjørt Samuelsen vísir eisini á, at hóast tað privata felagið skal gera tunnilin, verður tað almenna nógv við í henni kortini, tí Landsverk skal góðkenna alt, sum hevur við trygdina at gera.

- Samstundis er talan um tveir av longstu undirsjóvartunlum í heiminum og sostatt finnast ongi krøv um, hvussu trygdin skal skipast í tunlum, sum eru so langir, so tað almenn fær ein stóran leiklut undir øllum umstøðum.

Karsten Hansen, landsstýrismaður fíggjarmálum vil ongar viðmerkingar gera, tí nú skal samgongan gjøgnumganga tær útbyggingar, sum skulu gerast og so skulu tær raðfestast. Tí heldur hann, at tað er skeivt at siga nakað frammanundan um kravið frá sandoyartingmanninum.